# LEIÐARA SEMINAR Á HOTEL HAFNIA


Gunnar Gustavsen

**FGBMFI - FØROYAR hevur bjóðað Gunnari Gustavsen at halda seminar á Hotel Hafnia**

Evnið: Leiðsla, grundað á meginreglur Bíbliunnar
*Gunnar Gustavsen hevur ímillum annað verið leiðari fyri FGBMFI í Noregi í nøkur ár. Eisini hevur hann havt skeiðir innanfyri leiðslu, sølu, samráðingar fyri t.d. bankar, ídnað, handil og almennar stovnar.*

Skrá:

Fríggjadagin 23. mars 2001 *( Kostnaður 250,-)*

15.00 – 15.30 : *Vælkomin, kaffi*
15.30 – 17.00 : *Grundstøðið fyri leiðslu*
17.00 – 18.30 : *Týdningarmesta starvsfólkaamboð leiðarans*

Leygardagin 24. mars 2001 *( Kostnaður 250,- )*

09.00 – 10.00 : *Grundarlagið fyri hermálsligum samgongum*
10.00 – 11.45 : *Tað rætta fólkið til tað rætta staðið í virkinum*
11.45 – 12.00 : *Kaffisteðgur*
12.00 – 13.00 : *Amboðið FGBMFI. Endamál og arbeiðsháttur*

19.00 – 23.00 : *FGBMFI - »Galla dinner« (hátíðarhald), vitnisburðir, felags sangir, og eisini luttekur*
*Jens Lisberg við sangi*
*( Kostnaður 390,- u/drykkivørur )*

*Fráboðan til døgurðan 24. mars er í seinasta lagið fríggjadagin 23. mars kl. 11.00. Tilmelding á tel 21 62 30, Mads A. Winther ella Hotel Hafnia tel 31 32 33.*

Øll eru hjartaliga vælkomin

Full Gospel Business Men's Fellowship International



**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Deildarleiðari

## fyri bókhalds- og skrásetingardeildini í Streymoyar Øki

Starvi sum deildarleiðari er leyst at seta skjótast til ber. Starvið er skipað undir økisstjóranum í Streymoyar Øki

**Arbeiðsuppgávur:**
Starvið er fjølbroytt. Deildin kemur at taka sær av øllum bókhaldsarbeiði, ið viðkemur Streymoyar Øki., herundir

- skrásetingar/bókingar/broytingar o.a.m. av sjálvuppgávum, MVG-uppgerðum, ymiskum avgjøldum og stuðulsskipanum
- mistaksrættingar
- ymsar manuellar avstemmanir, herundir millum ymsar skipanir hjá T&S og við Føroya Gjaldstova
- eftirlit, herundir viðgerð av ymiskum EDV-útskriftum sum eitt nú feillistum

Í byrjanini verður uppgávan at stovna deildina herundir:

- at skipa fyri arbeiðnum at flyta bókhaldsuppgávurnar frá hinum deildunum í økinum til nýggju bókhaldsdeildina,
- og at samráðast við starvsfólkini, sum skulu flyta til nýggju deildina

Annars áliggur tað leiðaranum á deildini at skipað bókhaldsarbeiðið soleiðis, at tað verður gjørt effektivt, til lítar og til tíðina, og annars at taka lut í sjálvum bókhaldsarbeiðnum, tá hetta gerst neyðugt.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi, ið verður settur, skal
- hava drúgvar royndir/hollan kunnleika til bókhaldsarbeiði
- hava kunnleika til EDV-skipanirnar hjá Toll- og Skattstovuni og helst eisini til FLS-skipanina hjá Føroya Gjaldstovu
- hava góð samstarvsevnir, evni at samskipa og seta í verk fyriskipanir.

**Útbúgving**
Viðkomandi, ið settur verður, skal hava viðkomandi útbúgving, sum helst eisini skal umfata almenna fyrisiting

**Lønarviðurskifti**
Starvið, sum er eitt tænastumannastarv verður lønt í 31. lønarflokki. Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Umsókn við viðmælum og prógvum skulu sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Stýrið
Postsmoga 2151
Traðargøta 39
FO 165 Argir

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. apríl 2001. Um nakar ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kann viðkomandi seta seg í samband við Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, tlf. 352600, lokal 2655

Um stovnin:
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Í stýrinum eru fýra deidir: Eftirlitsdeidin, Lógardeildin, Menningardeildin og Umsitingardeildin. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.



FARTELEFONIR
GSM - NMT 450
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON NOKIA Connecting People
SIEMENS BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045




Taljur
Stroppar
Trýst-slangur
Spuli-slangur
Tórshavnar Maskinhandil
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
10 Tórshavn - Tlf. 313442


www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2119, **P/F Horisont, 530 Fuglafjørður.**

**Nevnd:**
Farin frá sum formaður: Simon Johan Kári Johannesen, 530 Fuglafjørður.
Innkomin sum formaður: Sigfríður Vørðhamar, 530 fuglafjørður.
Farin úr nevndini: Svend Karty Sigvardsen, Stoffalág 58, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Óli Samró, Marinargøta 9, 188 Hoyvík.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Sigfríður Vørðhamar, 530 Fuglafjørður.
Innkomin sum stjóri: Óli Samró, Marinargøta 9, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 16. marts 2001

Kristin Balle


CAFÉ NATÚR

Vit selja allir rættir út av húsinum t.d.
- Cafédrykkir og súpan í termokrússum
- Bakað epli o.a. heitir rættir
- Sandwich o.m.a.

Livandi tónleikur
*Hans Petur í Brekkunum
Bjarki Meitel
og
Herluf Sørensen
Spæla 23. og 24. mars*

Broyttur matarseðil
Nógv nýtt leskiligt er komið á matarseðilin, t.d. av víni og cafédrykkum. Nógv nýggj sløg av sand-wich.
*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25



Prentaralærlingur

*P/F Estra Prent søkir eftir prentaralærlingi (trykkteknikara) at byrja 1. mai 2001.*

Útbúgvingin sum trykkteknikari tekur 4 ár, harav 45 vikur eru á tekniskum skúla í Danmark. Hesar 45 vikurnar verða tiknar yvir 5 tíðarskeið, harav tað longsta er 20 vikur.

Um tú ert arbeiðssamur og nærlagdur, og annars dámar væl at verða við har nakað hendir, er hetta starvið helst nakað fyri teg.

Áhugað verða biðin um at senda skrivliga umsókn. Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin **28. mars. 2001.**

Um tú vilt vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á telefon 441085.

estra®

P/F Estra Prent . FO-510 Gøta . Tlf. 441085 . Fax 441673



Norðurlandahúsið í Føroyum
*Sí SVF tekstvarp s. 650*



Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tanntekniknari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



Sosialurin i
Sosialurin


# Skeiðstilboð fyri S&K-limir 2001

| Skeiðsheiti | Nr. | Tíð | Kl. | Stað | Lærari | Freist |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Søla og tænasta | 1 | 3. og 5. apríl | 13.00 — 17.00 | Føroya Handilsskúli | Annfinnur Zachariassen | 23. mars |
| Sálarfrøði og Tænasta | 2 | 15.,17.,22. og 29 mai | 16.00 — 20.00 | Føroya Handilsskúli | Bergur Godtfred | 28. apríl |
| Telefontænasta | 3 | 13. og 14. september | 09.00 — 16.00 | Hotel Føroyar | Kjeld Andersen | 24. august |
| Roknskaparfatan | 4 | 9., 23. og 30. oktober | 13.00 — 17.00 | Føroya Handilsskúli | Olav Absalonsen | 21. september |
| Word | 5 | 20., 27. apríl, 4. og 9. mai | 08.30 — 12.15 | Føroya Handilsskúli | Steinbjørn í Dali | 30. apríl |
| Excel | 6 | 17., 24., 31. august og 7. sepember | 08.30 — 12.15 | Føroya Handilsskúli | Steinbjørn í Dali | 27. juli |
| Internet | 7 | 21. og 28 september og 5. oktober | 08.30 — 12.15 | Føroya Handilsskúli | Steinbjørn í Dali | 31. august |

***Skeiðini verða hildin treytað av at tey verða fullteknað.***

**Tilmelding hjá:**
S&K-felagnum
Tlf. 316837
Fax: 310451
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

**Gjalding:**
*Gjaldast skal við tilmeldan*